MÁLTEIGURIN

Tann søta oljan

Tað gongur skjótt fyri seg í løgtinginum. Nýggjar lógir koma bóltandi við næstan somu ferð, sum nýggir stjórar og fulltrúar og yviratstøðingar verða settir.

»Kolvetni« var á hvørjari tingmanstungu herfyri. Vit fingu at vita, at nú skuldi øll oljuútgerð um føroyskan kaikant, t.e. »bryggju-hyrning«, eftirsum kantur nú skal eita hyrningur. Ein merkilig málslig einrøktan merkist í tinginum. Tá ið ein fer at siga kolvetni, so siga allir kolvetni. Men eingin spyr, hvat hetta man vera.

Tað skilst av samanhanginum, at »kolvetnislógin« handlar um olju. Men sambært fleiri orðabókum er kolvetni eitt gott føroyskt (t.e. íslendskt) orð fyri »kolhydrat«, sum stórt sað er tað sama sum – sukur!

Onkur er helst vilstur í tí íslendsku orðabókini. Har er »kulhydrat« umsett til »kolvetni«; men »kulbrinte« er umsett til »kolvatnsefni« (Dönsk-íslensk orðabók, 1992). Í eykabindinum hjá tí føroysku-dansku orðabókini (1974) verða bæði »kolvetni« og »kolvætuevni« umsett til »kulhydrat«. Á mjólkarpakkanum eitur kolhydrat »kolvæta«. Bara tann nýggja danska-føroyska frá fróðskaparfelagnum roynir nøkulunda at halda skil á. Hon kallar »kulbrinte« fyri »kolbrintu, kolvetni«, og »kulhydrat« verður til »kolhydrat, kolvæta«.

Tað danska orðið »kulbrinte« verður av teimum lærdu brúkt sum felagsheiti fyri kol, olju og gass í undirgrundini. H. C. Ørsted gjørdi í 1814 orðið »brint« fyri hydrogen, sum á grikskum merkir »tað, sum ger vatn«. Hví ikki bara siga olja og gass? Ella bara: olja? Allir almindiligir føroyingar tosa um oljuvinnu, oljuboring, oljupengar og oljudálking. Hví kunnu tingmenn so ikki eisini samtykkja eina oljulóg? Tað er eitt orð, sum øll forstanda. Tingið skal tala við tign, og tey kunstigu spæliorðini klæða ikki tinginum; virðingin minkar, og skattborgarin verður sorgarbundin.

Eitt annað heimabundið oljuorð er *eyðflyting* fyri evakuering. Hevði tað so verið »neyðflyting«, so kundi lesarin sað ta meining, at hetta var at flyta fólk, sum vóru í neyð. Eitt annað orðaskepilsi kundi verið »eyðtøka« fyri at taka fólk burtur, sum eru í neyð, men tað minnir for nógv um neyðtøku, so tað ber ikki til.

Evakuering bleiv brúkt undir krígnum saman við orðum sum konvoy, signal, sirena, alarmur, barakk og messa. Hetta eru alt samalt militer fakorð, sum vit tíðetur sjáldan hava brúk fyri. Og nettupp tí er tað óneyðugt at pilka við tey. Tey hava eitt neyvt og týðiligt innihald til sítt avmarkaða brúk. Og skuldi tað ólukkuliga hent, at tað eina ferð í framtíðini gjørdist neyðugt at flyta fólk burtur av einum føroyskum boripalli, tí til dømis eldur var í, so var tað ein avgerandi fyrimunur, um eisini teir útlendsku arbeiðsfelagarnir forstóðu, hvat var á vási. At biðja til dømis bretar »hurry up!, tí nú er *eyðflyting*, fer ikki at spara nógv sekund.

Tað er krevjandi og farligt at arbeiða á boripallinum. Gera hesir menn ein tekniskan feil, so kunnu teir verða um ein háls. Ólika fittligari og friðaligari er arbeiðið hjá tingmonnum á røðarapallinum. Tað hendir so eingin mansskaði, um tingmenn durva eina løtu, men tað má tó undra, at teir av misgáum hava gjørt eina oljulóg um sukur, siropp og aðrar søtar vørur.

D

VALUTAKURSIR

		06.03.98	Ultimo síðsta mán.
USA	**Dollarar**	698,9000	690,1000
Bretland	**Pund**	1142,2300	1136,4000
Týskland	**Markur**	381,4400	381,5100
Svøriki	**Króna**	86,7300	86,2900
Noreg	**Króna**	91,8700	91,4900
Frakland	**Frankur**	113,8500	113,8600
Belgia	**Frankur**	18,5030	18,5000
Sveits	**Frankur**	468,6800	470,7600
Holland	**Gyllin**	338,4200	338,4800
Italia	**Líri**	0,3888	0,3877
Finnland	**Markur**	125,8700	125,8900
Ísland	**Króna**	9,7500	9,7900
Eysturriki	**Skillingur**	54,2550	54,2620
Spania	**Pesetas**	4,5090	4,5090
Portugal	**Escudos**	3,7360	3,7330
Kanada	**Dollari**	492,4200	485,6500
Grikkaland	**Drakmur**	2,4410	2,4360
Japan	**Yen**	5,4946	5,4809
Írland	**Pund**	949,4400	945,2200
	XEU	755,1500	754,3300

FØROYA SPARIKASSI



KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Helgi og Hans Pauli Hansen
Ulvevej 44th
DK 6715 Esbjerg

Loysnin frá seinastu viku

Loysunarorðið: HISSINISØRINDI

M	A	N	C	H	E	S	T	E	R	U	N	I	T	E	D
A			H	E	N	T	A		E	V	E	N		L	
N	I	C	E		D		C	I	A			T	E	I	R
149	C	E	L	T	I	C		A	L	F	R	E	D		Ø
H	A	N	S	A	→	R	O		M		A	R	N	A	R
E		T	E	L	T	O	W		A	N	N		A	N	I
R	Ú	N	A		E	S		M	D		G	A		N	N
F		A		M	O	T	H	E	R	W	E	L	L		G
Ø	G	R	U	M		O		G	I		R	E	I	N	U
L	E	I	R		A	C	E		D	E	S		V		R
G	Y		R	Ø	K	K	U	R		L		V	E	B	
E	T	H	E	L				A		I	B		R	E	D
	I	E	I		A	G	G		V			U	P	I	
A		I	M	A	T	R	A		A	L	A	G	O	N	
G	I	N			L	A	S		H	U	G	L	O	T	I
A		E	I	D	I	S	B	Ó	L	T	F	E	L	A	G

Hvønn loygardag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

150

Loysunarorðið: .....

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá
BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Ljósini slókna**
- ❑ **Søgur úr Port Janua**
- ❑ **Biblian í orðum og myndum**
- ❑ **Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika**
- ❑ **Mangt er millum himmal og jørð**

Frá
FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið**
- ❑ **Heimssøga 1**
- ❑ **Søgan um hini**
- ❑ **Lív og gróður**
- ❑ **Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.